# FM-finala í bridge

Leygardagin verður finalan í FM fyri pør í Bridgehúsinum í Havn. Byrja verður klokkan 10, og spæld verða 57 spøl. 20 pør eru við í finaluni, og tey hava vunnið sær finalupláss at vinna undankappingar, sum bridgefeløgini hava havt í vetur. Eisini skipaði Føroya Bridgesamband fyri einari undankapping, har níggju tey fremstu pørini vunnu seg í sjálva finaluna. FM-finalan leygardagin er skipað soleiðis, at øll pørini koma at spæla trý spøl móti hvørjum øðrum.



# Høgni Madsen við til Íslands

Høgni Madsen úr NSÍ er nýggjasti spælarin í føroyska landsliðshópinum, sum sunnudagin 22. mars skal spæla vinardyst ímóti Íslandi í Kórinn-høllini á Kópavogi. Hann avloysir Paula G. Hansen úr EB/Streymi, sum hevur givið avboð vegna skaða. Høgni Madsen var nakrar ferðir við í landsliðshópinum í fjør, og teir báðir A-landsdystirnir, hann er skrásettur fyri, vóru venjingardystirnir ímóti Estlandi og Portugal.



*Føroysku fótbóltsmenninir eru framvegis nummar 185 á FIFA-styrkilistanum, og var tað ikki fyri javnleikinum ímóti Eysturríki, lógu Føroyar óivað væl lægri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Menninir standa í stað

**Føroyska manslandsliðið er framvegis nummar 185 á FIFA styrkislistanum, men kann fáa nógv burtur úr einum góðum úrsliti ímóti Íslandi um góðan mánað**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Føroyska A-landsliðið hevur veruliga nakað at spæla fyri, tá tað undir taki fer á vøllin ímóti Íslandi í Kórinn-høllini á Kópavogi sunnudagin 22. mars.

Ein sigur ella ein javnleikur kann førka okkum upp eftir FIFA-styrkislistanum, har vit í skrivandi stund eru nummar 185 av teimum tilsamans 207 FIFA-limalondunum.

Ísland er heili 110 pláss framman fyri Føroyar, og í Europa eru tað bara Andorra og San Marino, sum liggja aftan fyri Føroyar á styrkislistanum.

Av pinkutjóðunum er Ísland á 75. plássi eisini tann fremsta. Kypros er nummar 84, Luxembourg 122, Malta 146, Liechtenstein 151, og so koma tvær tjóðir aftan fyri Føroyar, sum eru Andorra á 195. og San Marino á 201. plássi.

Svøríki er við sínum 25. plássi besta norðurlandið, og síðani er Danmark nummar 38, Norra 45, Finnland 57, Ísland 75 og Føroyar altso nummar 185.

Besta landslið í heiminum eigur Spania, og hini í topp-10 eru, í hesi raðfylgju: Týskland, Holland, Italia, Brasil, Argentina, Kroatia, Russland, Ongland og Portugal.

# Aftur galla fyri tey ungu

**Eins og í fjør, hevur H71 tikið stig til at skipa fyri gallaveitslu fyri teir ungu hondbóltsspælararnar, gentur og dreingir 17 ár.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Seinnu árini er gallaveitslan hjá teimum vaksnu blivin eitt gott punktum fyri kappingarárinum. Í fjør helt H71, at ungdómsspælararnir í deildunum gentur og dreingir 17 ár eisini skuldu hava eina veitslu, og tað átakið eydnaðist serstakliga væl.

Tí verður tað endurtikið í ár, og aftur hesa ferð verður gallaveitslan hjá teimum ungu í auluni í Studentaskúlanum í Hoydølum. Veitslan verður leygarkvøldið 21. mars klokkan 19, og spælararnir skulu melda seg til og møta gallaklæddir. Borðreitt verður við tveimum rættum og eftir borðhaldið verður dansur.

Stóra hæddarpunktið á kvøldinum er, tá ársins spælari, besti málskjútti, ársins málverju, ársins venjari og møguliga ársins stjørnuskot verða heiðrað. Hvørt felag í ávikavist gentu- og dreingjadeildini fær eina atkvøðu til hvørt heiti, umframt at venjararnir hjá feløgunum hava eina atkvøðu. Ikki er loyvt at atkvøða fyri einum av sínum egnu spælarum.

– Tað er ofta í seinnu helvt av tannárunum, at ungdómurin steðgar við at íðka ítrótt, ella í øllum førum velja tey sær tá kanska einans eina ítróttargrein millum tær ítróttargreinirnar, sum tey hava gingið til, siga tey frá H71.

–Tíverri hevur tað víst seg, at tað ofta er hondbólturin, sum verður valdur frá í hesum árunum, og er hetta ein vanlagna fyri føroyskan hondbólt. Við gallaveitsluni og teimum heitunum, ið ætlanin er at kjósa á veitsluni, vóna vit at kunna verða við til at geva teimum ungu nakað at síggja fram til og stríðast fyri.

Freistin at melda til gallaveitsluna er úti í morgin.



*Nakrir av bestu spælarunum síðsta kappingarár, sum blivu heiðraðir á gallveitsluni fyri tey ungu*

# Fótbóltskvinnurnar farnar trý pláss upp

**Føroyska kvinnulandsliðið er nummar 67 á nýggjasta FIFA-styrkislistanum, og hevur bæði Luxembourg og Malta aftan fyri seg**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Kvinnulandsliðið í fótbólti hevur eina munandi betri "ranking" - styrkismeting - enn manslandsliðið, staðfestir nýggjasta dagføringin av FIFA-styrkilistanum.

Har eru føroysku fótbóltskvinnurnar nú nummar 67 av 150 kvinnulandsliðum kring heimin, og samstundis staðfestir styrkilistin, at okkara kvinnur síðani februar eru fluttar trý pláss upp eftir styrkislistanum.

Stuttligt er eisini at síggja, at Føroyar hava tvær av hinum pinkutjóðunum aftan fyri seg, tí Luxembourg er nummar 90 og Malta nummar 99.

## Sterk norðurlond

Norðurlond eru – sum altíð – sera sterk í kvinnufótbólti, og serliga íslendska kvinnulandsliðið hevur tikið seg nógv fram seinnu árini.

Trý norðurlond eru millum 10 tey bestu í heiminum, tí Svøríki er nummar fýra, Norra nummar seks og Danmark nummar sjey. Síðani eru Finnland nummar 17 og Ísland bert tvey pláss aftanfyri, sum nummar 19.

Skoytast kann uppí, at Bermuda, sum tapti 0-3 ímóti føroyska kvinnulandsliðnum á Oyggjaleikunum í Hetlandi í 2005, er nummar 112 á FIFA-styrkislistanum.

Heimsins sterkasta fótbóltstjóð hjá kvinnum er USA, framman fyri Týskland og Brasil.